# Hoffenheim mátti lúta

Toppdysturin í týskum fótbólti um vikuskiftið endaði við sigri til stóra felagið. Uppflytararnir Hoffenheim hava tikið øll á bóli í ár, og liðið lá á odda fyri toppdystin ímóti stórfelagnum Bayern. Hoffenheim legði seg á odda, men Bayern javnaði. Og í yvirtíðini av dystinum skoraði Luca Toni sigursmálið fyri Bayern, sum nú liggur undir liðini á Hoffenheim við 34 stigum.



# Aston Villa fríggjar til Henke

Henrik Larsson er eftir øllum at døma á veg til enskan fótbólt. 37 ára gamli framherjin var annars farin heim til Helsingborg at spæla, men hann hevur hug at royna seg uttanlands aftur. Everton hevur sýnt áhuga fyri Henke, men nú skal Aston Villa var besta boðið. Venjari í Aston Villa er Martin O'Neill, sum áður hevur verið venjari hjá Henke í Celtic.

## Stórsigur til hond-bólts-útisetar

**Eyðun Højgaard gekk á odda, tá føroysku hondbóltsharrarnir vunnu stórt í gjár, meðan kvinnurnar ikki spæla fyrr enn týsdagin**

HONDBÓLTUR
*Rólant Waag Dam*
*rolant@sosialurin.fo*

29-17 gjørdist úrslitið av dystinum, ÍF Føroyar og HIK spældu í gjár. Júst tað, føroysku menninir høvdu brúk fyri, eftir skuffandi javnleikin farna vikuskifti.

Frá fyrsta bríksli lýsti viljin úr monnunum, og við einari sera vælleikandi verju gav tað eisini nógv skjótálop og mál. Eftir tíggju minuttum var støðan heili 13-4 til ÍF Føroyar, men so settu teir ferðina niður og hálvleiksstøðan gjørdist 17-8.

Seinni hálvleikur byrjaði eisini róliga, og hetta gav HIK bæði tíð og pláss, so munurin minkaði niður í 19-13. Tættari enn tað sama gjørdist tað ongantíð, tí ÍF Føroyar setti ferðina upp aftur, og við stórleikandi vongunum, Eyðun Højgaard og Helga Justinussen, staðfestu føroyingarnir stórsigurin.

Málskjúttarnir vóru Eyðun Højgaard 10, Helgi Justinusen 7, Hjalti Jacobsen 4, Leif Mikkelsen 2, Hanus Johansen 2, Rani Slættanes 2, Leif Hákun Jacobsen 1 og Petur Óli Samuelsen 1.

ÍF Føroyar liggur nú fremst við 13 stigum, meðan Team Nørrebro hevur tíggju stig og hevur spælt tveir dystir færri.

Kvinnurnar hava frívikuskifti, men spæla útsettan dyst týskvøldi ímóti CBS Håndbold.

H71-StÍF 25-19 (12-10):

# Hoyvíkingar hanga í

**Fyri steðgin kravdi tað framúr málmansspæl, men tá H71 eftir steðgin setti ferðina í topp, fingu strandingar ikki gjørt tað heilt stóra**

HONDBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

H71 mest sum krøkti StÍF av oddastríðnum, tá liðini gjár dystaðust í Hoyvíkarhøllini.

Strandingar hava annars hingið væl í oddaliðunum fyrsta fjórðingin av kappingarárinum, hóast liðið hevur verið fleiri lyklaspælarar fyriuttan. Ikki minst báðar Justinusse-beiggjarnar, og hetta var als ikki broytt sunnudagin.

### Levi var framúr

Fyri steðgin gjørdi hetta tó ikki tann heilt stóra munin. Í álopspartinum megnaði liðið fyri tað mesta at bíða eftir møguleikanum, og eisini í verjupartinum gekk so heilt hampuliga væl.

Tað var tó ein spælari á H71-liðnum, sum støðugt helt seg oman fyri strandingar. Leiv Nybo hevur støðugt ment seg til ein tann fremsta málverjan í landinum, og hóst Marian Cirloganescu hjá StÍF hevði sína vanliga stóru nøgd av bjargingum, so var hetta lítið móti teimum, sum Levi støðugt framdi í Hoyvíkarmálinum.

Tí hildu hoyvíkingarnir seg eisini støðugt frammanfyri, og tá Janus Sørensen so veruliga tendraði kanónina seinna partin av fyrra hálvleiki, fekk heimaliðið alt betri hug at renna avstað.



*Borgar Danielsen hevur her gott tak á Danni Syhler, men í longdini megnaði StÍF ikki at fylgja við H71*
*Mynd: Álvur Haraldsen*

**FAKTA um dystin**

**H71-StÍF 25-19 (12-10)**
10 min: 4-3
20 min: 11-8
40 min: 18-12
50 min: 22-15
**Málskjúttar**
**H71:** Janus Sørensen 7(1), Dánjal Tórgarð 6(2), Halgir Dahl Olesen 4(1), Regin Joensen 3, Gunnar Bláberg 2, Johnny Durhuus 1, Esbern Patursson 1, Niels Viggo Niclassen
**StÍF:** Jørmund Joensen 4, Kári Horn 3, Alexandur Johansen 3, Mortan Hansen 3, Rúni Johansen 3, Borgar Danielsen 1, Arnhold Berg 1, Bárður B. Danielsen 1
**Brotskøst:** H71 5
**Útvísingar:** H71 2, StÍF 5
**Dómarar:** Sámal Paulason & Kári Hansen

### Seks á rað

Og hóttanin gjørdist eisini veruleiki, tá seinni hálvleikur byrjaði.

H71 skoraði nevnliga fyrstu seks málini eftir steðgin, og so var tað ikki longur ein spurningur um, hvønn vegin sigurin skuldi fara. Eitt skifti stóð somikið nógv sum 22-12 á talvuni, og tað bendi veruliga á sorl. Og hóast StÍF slapp at pynta um úrslitið, so kom sigurin hjá heimaliðnum slettis ikki í vanda.

Sigurin ber við sær, at H71 framveigs er ájavnt Neistanum í dystinum um annað plássi á stigatalvuni, so tað er veruliga lagt upp til grannabrak, tá Neistin vitjar í Hoyvík um eina viku.

StÍF er nú hinvegin trý stig aftan fyri tey bæði liðini, so ráðini eru ikki til at missa so øgiliga nógv afturat, um teir framvegis vilja spæla við í oddinum.

VB-Kyndil 29-13 (16-9):

# Oddaliðið gjørdi bart

**Kyndi fekk ikki eitt bein til jørðina, tá tær vitjaðu í Vági**

HONDBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Meðan Stjørnan ikki spælir fyrr enn í annaðkvøld, brúkti VB dagin í gjár til at økja munin til Klaksvíkarkvinnurnar upp í trý stig.

Kyndil var stigaleyst undan dystinum í gjár, og satt at siga var ongan tíð nakað serliga sannlíkt, at tær skuldu fáa fyrsta stigið í gjár.

VB setti seg frá byrjan á dystin, og hóast Kyndil fylgdi so hampuliga væl við fyrsta góða korterið ella so, so stóð greitt, at yvirvaldið var dekan av stórt hjá teimum grønu.

Seinastu løtuna undan steðginum tók VB eisini veruliga dik á seg, og eftir steðgin var eingin bøn. VB vann seinna hálvleik ikki minni enn 13-4, og tað boðar frá tí muninum, sum eigur at vera millum topp og botn í deildini.

Soleiðis heldur VB framvegis rimmarfast um oddasessin, tó at munurin væl kann minka niður í eitt stig longu í annaðkvøld.

Kyndil hevur hinvegin framvegis einki stig, og hjá teimum ræður um at sláa til, tá tær um viku vi ja á Skála.

**FAKTA um dystin**

**VB-Kyndil 29-13 (16-9)**
10 min: 6-3
20 min: 9-7
40 min: 20-10
50 min: 27-12
**Málskjúttar**
**VB:** Gurið Mortensen 7, Daiva Toumaite 6, Laila Jespersen 3, Aukse Vysniaskaite 2(2), Una Egilsdóttir 2, Sára Samuelsen 2, Svava Vestergaard 1, Bára Mortensen 1
**Kyndil:** Ása Christiansen 4, Barbara Egilstrøð 3, Ronja Mikkelsen 2(2), Helena á Krákusteini 1, Beinta Laursen 1, Halla Midjord 1, Linda Johannesen 1
**Brotskøst:** VB 4, Kyndil 3
**Útvísingar:** VB 1, Kyndil 2
Blagoje Buha & Zeljko Jotic